










# MEST miðjar móti miðvísari marknaðarføring og menning

Jan Müller

08.05.2015 - 14:16

Oljan.fo

Stórar broytingar eru hendar í MEST-samtakinum seinastu tíðina. Í fjør keypti P/f Krúnborg fyritøkuna frá EIK. Um somu tíð skrivaði MEST søgu, tá ein av heimsins størstu boripallum, West Hercules kom inn á Skálafjørðin sum kundi hjá m.a. MEST. Pallurin varð har í meira enn ein mánað og fekk gjørdar ymsar umvælingar. Og nú hevur fyritøkan av álvara fingið "blóð uppá tonnina" og er farið undir meira miðvísa marknaðarføring í útlandinum. Í hesum sambandi hevur fyritøkan sett nýggja sølu- og marknaðarleiðara,

Richard Morensen, sum er eitt kent andlit í føroyskari vinnu. Og nú tekur fyritøkan enn eitt nýtt stig, sum er ein spildurnýggj heimasíða, ið skal vera partur av marknaðarføringini av hesi so skjótt vaksandi føroysku fyritøkuni, www.mest.fo

Heimasíðan er andlitið hjá fyritøkuni í mun til tess umhvørvi – kundar, veitarar og borgarar. MEST ynskir at verða ein framsøkin og kundavend fyritøka og eigur heimasíðan tí eisini at endurspegla hetta. Nú eru bæði snið og innihald broytt fyri at stuðla undir hesum.

Tann enska útgávan verður klár í næstum – fyri at endurspegla at fyritøkan í størri mun ynskir at venda sær til útlendskar kundar.

“Endamálið er at geva okkara kundum og samstarvsfeløgum eina munandi lættari atgongd til upplýsingar um okkum og okkara tænastur”, sigur Mouritz Mohr, stjóri í tíðindaskrivi.

Heimasíðan umboðar høvuðsvirkisøkini hjá MEST :

· **Skipasmiðjuvirksemi** í MEST Tórshavn og MEST Skála

· **Framleiðsluútgerð** til vinnuna á sjógvi og landi í MEST Runavík

· **Offshore tænastur** og arbeiðsmegi til oljuvinnuna PAM Offshore Service